

Ford Galaxy:

# Stórur og rúmligur MPV og vørubilur

**Ford Galaxy hevur verið á marknaðinum í nøkur ár. Fyri tveimum árum síðan fekk bilurin eina »facelift«, tá hann broyttist nógv, serliga innan. Bilurin verður gjørdur í Portugal og fæst sum 7 persóna familjubilur og sum vørubilur**

Bilar

*Magnus Gunnarsson*

Galaxy er ein bilur við nógvum ymiskum møguleikum, hann kann hava upp til sjey sitipláss.

Bilurin verður gjørdur í Portugal á somu verksmiðju, sum VW Sharan og Seat Alhambra.

Galaxy hevur verið á marknaðinum í nøkur ár. Bilurin er ein stórur MPV við nokk av plássi og kann brúkast til nógv ymisk endamál.

Aftaru setrini kunnu flytast eftir ynski ella takast úr bilinum, alt eftir hvat hann skal brúkast til.

Galaxy verður gjørdur í trimum útgávum, Ambiente, Trend og Ghia. Standard útgerðin er sera umfatandi, og møguleiki er fyri at velja eykaútgerð eftir egnum ynski. Bilurin fæst við trimum ymiskum bensinmotorum og tveimum dieselmotorum. bensinmotorarnir eru: 2.0 litur 4 syl. við 115 hk, 2,3 litur 4 syl. við 145 hk, 2,8 litur V6 við 204 hk. Dieselmotorarnir eru: 1, 9 litur 4 syl. TDI við 90 hk ella við 115 hk.

Galaxy fæst eisini sum vørubilur.

Býligasti Galaxy kostar 290.000 krónur.



*Galaxy innan*

*Her sæst Galaxy við seks sitiplássum*

## Ford Galaxy TDI

| | |
|---|---|
| Motorurin | 1,9 litur 4 syl. diesel 115 hk v. turbo og intercoolara |
| 0-100 km/t | 13,7 sek. |
| Dekkstødd | 215/55-16 |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 464,1 cm |
| Breidd | 181,0 cm |
| Hædd | 175,9 cm |
| Egini vekt | 1650 kg |
| Søluumboð | P/F Wenzel<br>Akranesgøta 5<br>FO-100 Tórshavn<br>Tel. 354500<br>www.wenzel.fo |



# Ford Fusion - sum familju- og vørubilur



*Jóan Petur Olsen, søluleiðari hjá P/F Wenzel við nýggja Ford Fusion 1.6*

**Ford Fusion, ið er MPV útgávan av nýggja Fiesta, fæst bæði sum familjubilur og vørubilur. Bilurin er í stødd við Fiesta, men hann er hægri og hevur harvið meira pláss. Fusion fæst bæði í diesel og bensin útgávum**

Bilar

*Magnus Gunnarsson*

Ístaðinfyri at gera ein Fiesta stationcar, kom Ford á marknaðin við Ford Fusion, ið er ein MPV útgáva av Fiesta.

Talan er um ein rúmligan og praktiskan bil, har tey ferðandi í bilinum sita høgt og hava gott útsýni. Bilurin hevur størri fríhædd og sær út sum ein »off-roadari«.

Fusion er væl egnaður til ungar barnafamiljur, sum hava brúk fyri einum rúmligum bili, uttan at hann harvið neyðturviliga má vera so stórur.

Bilar í hesi støddini verða nógv brúktir sum vørubilar. Fusion fæst við 1,4 og 1,6 litur bensinmotorum við ávikavist 80 og 100 hk og við einum 1,4 litur TDCi common-rail turbodiesel motori við 68 hk.

Tá sølustjórin hjá Ford var á vitjan í Føroyum í fjør, bóru teir hjá P/F Wenzel upp á mál við hann, at teir manglaðu ein bil í staðin fyri Escort vørubilin, sum var ein rúmligur vøru bilur til sera kappingarføran prís. Teir vóru t.d. nógv seldir sum arbeiðsbilar hjá fyritøkum, og serliga vóru bøndurnir væl nøgdir við teir. Úrslitið varð at teir fingu Ford Fusion sum vørubil til føroyska marknaðin. Bilurin er serliga væl egnaður hjá handverkarum, ið ikki hava brúk fyri ovstórum lastarúmi, men ynskja ein arbeiðsvinarligan bil sum er lættur at koma úr og í. Fusion verður einans gjørdur við 5 hurðum og fæst í útgávunum Trend og Elegance.

## Ford Fusion 1,6

Motorurin:
1,6 litur 4 syl.
bensin við 100 hk

0-100 km/t:
10,9 sek

Bensinnýtsla:
15,2 km/l

Dekkstødd:
195/60-15

Stødd og vekt
Longd:
402,0 cm
Breidd:
171,0 cm
Hædd:
150,0 cm
Eginvekt:
1100 kg
Viðførisrúm:
337 / 1175 litrar

Prísur:
úr kr 184.000 sum persónbilur

úr kr 143.000 sum vørubilur

Søluumboð:
P/F Wenzel
Akranesgøta 5
FO-100 Tórshavn
Tel. 354500
www.wenzel.fo

# Ford Motor Company verður hundrað í ár

**16. juni í ár eru liðin 100 ár síðan Ford Motor Company varð stovnað. Í ár eru eisini liðin 140 ár síðan stovnarin av fyritøkuni, Henry Ford, varð føddur, og 90 ár síðan hann, sum tann fyrsti í heiminum, byrjaði at framleiða bilar á samlibandi**

BILAFRAMLEIÐSLA

*Magnus Gunnarsson*

Henry F. Ford varð føddur í 1863. Hann var bóndasonur, men hugur hansara stóð meira til mekanik enn til jarðarbrúk. Tá tey motordrivnu akførini komu fram, fekk Henry Ford beinanvegin stóran áhuga fyri teimum, og longu í 1888 gjørdi hann royndir við bensinmotorum á sínum egna lítla verkstaði. Í 1896 gjørdi hann sína fyrstu roynd at gera ein bil við súkkluhjólum og 2 cyl. motori.



*Henry Ford og konan, Klara, í einum av fyrstu Ford-bilunum*

Ford Motor Company var stovnað 16. juni 1903. Fyrstu bilarnir vóru Ford A, síðan kom Ford B. Ársframleiðslan í 1906 var næstan 9000 bilar. Henry Ford og hansara fólk gjørdu í 1907, klárt til Ford T, sum skuldi verða ein "bilur til fólkið" og seljast um allan heimin, Neyðugt varð tí at bilurin skuldi verða slitsterkur, einfalt bygdur og lættur at viðlíkahalda. Framleiðslan byrjaði í desember 1908. Tað sum gjørdi Ford T so kendan, var at bilurin var framleiddur so leingi og í so stórum nøgdum. Íalt vórðu framleiddir yvir 15 milliónir bilar fram til 1927. Frá 1913 varð framleiðslan av Ford T flutt yvir á samliband. Hetta hevði við sær at arbeiði gekk so skjótt at bilarnir kundu seljast til sera kappingarførar prísir. Handan hav komu bilverksmiðjur í einum landi fyri og øðrum eftir. Tann fyrsta kom í Manchester í 1911. Eisini í Danmark komu verksmiðjur sum settu Ford bilar saman í 1919.

Í 1944, tann 23 januar, tekur Henry Ford ll, sonur Edsel, abbasonur Henry Ford, við sum leiðari í Ford Motor Company. Henry Ford doyr tann 1.apríl 1947, 83 ára gamal. Ein sermerktur persónur, ið læt eina risastóra fyritøku eftir seg, og fekk av álvara gongd á bilaframleiðsluna í Amerika og restini av heiminum. Ein triðing av inntøku síni gav hann til vælgerandi endamál. Ford hevur ment seg til eina alheims fyritøku. Amerikanska høvuðssæti er í Dearborn við Detroit. Fyritøkan er privat, og ovasta leiðslan hevur alla tíðina verið í Ford familjuni.